Januar 2022

# Kunning um viðgerð av persónupplýsingum í Trygd

Trygd er eitt tryggingarfelag, ið bjóðar øll sløg av skaðatryggingum til privatpersónar og virkir. Sum partur av rakstrinum av fyritøkuni verða upplýsingar um kundar (persónupplýsingar) viðgjørdar. Hetta gera vit fyri at veita tær best møguligu tænastuna og fyri at halda viðkomandi lóggávu. Vit taka øll neyðug stig fyri at verja tínar persónupplýsingar í samsvari við galdandi lóggávu. Niðanfyri kanst tú lesa meira um, hvussu Trygd verjir tínar persónupplýsingar og lógartryggjaðu rættindi. Sambært § 24 í dátuverndarlógini[1] skulu vit kunna teg, tá vit fáa upplýsingar um teg frá øðrum.

Kunningin, sum vit skulu geva tær er upplýsing um:

1. Vit eru dátuábyrgdari – Hvussu kanst tú seta teg í samband við okkum?
2. Samskiftisupplýsingar hjá dátuverndarfólki
3. Endamálið við viðgerðini og heimildin fyri hesari
4. Sløg av persónupplýsingum
5. Móttakarar ella bólkar av móttakarum av persónupplýsingunum
6. Flutning til útland, triðjaland ella millumtjóðafelagsskap
7. Hvaðani persónupplýsingarnar stava
8. Tíðarskeiðið, sum persónupplýsingarnar verða goymdar
9. Rættin til at taka samtykkið aftur
10. Tíni rættindi
11. Kæru til Dátueftirlitið

Hetta skriv er bert til kunning. Hevur tú spurningar, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum.

[1] Løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónupplýsingum (Dátuverndarlógin)

**Vit eru dátuábyrgdari – Hvussu kanst tú seta teg í samband okkum?**

P/F Trygd er dátuábyrgdari fyri viðgerðina av persónupplýsingum:

P/F Trygd
Oknarvegur 5
100 Tórshavn
V-tal: 324086
+298 35 81 00
trygd@trygd.fo

**Samskiftisupplýsingar hjá dátuverndarfólki**

Um tú hevur spurningar til okkara viðgerð av tínum upplýsingum, ert tú altíð vælkomin at seta teg í samband við okkara dátuverndarfólk:

Teldupostur: dpo@banknordik.fo

Oknarvegur 5, Postboks 3048

FO-110 Tórshavn

Tlf.: +298 330 330

**Endamálini við og heimildin fyri viðgerðini av tínum persónupplýsingum**

Vit skráseta og brúka tínar persónupplýsingar fyri at kunna veita tær best møguligu ráðgevingina og tænasturnar, fyri at halda avtalur við teg og fyri at halda tey lógarkrøv, sum eru áløgd okkum. Tað merkir, at vit skráseta og brúka persónupplýsingar, tá ið:

- Tú hevur teknað ein trygging hjá okkum
- Tú hevur gjørt ella umhugsar at gera eina avtalu við okkum um eina tænastu
- Tú hevur fráboðað ein skaða til okkum ella ert ein partur í eini skaðasak, sum vit viðgera
- Tú hevur givið okkum samtykki til at viðgera tínar persónupplýsingar til eitt ella fleiri ávís endamál
- Tað sambært lóg er álagt okkum at viðgera ávísar persónupplýsingar, t.d. sambært
  - Lóggávu um tryggingarvirksemi
  - Lóggávu um tryggingaravtalur
  - Lóggávu um arbeiðsskaðatrygging
  - Skattalóggávu
  - Roknskaparlóggávu

    - Lóggávu um fyrning
    - Dátuverndarlóggávu
- Tá tað er neyðugt fyri av røttum at kunna fylgja heimilaðum áhugamálum hjá Trygd, smb. § 8, stk. 1, nr. 6, í dátuverndarlógini.
    - Í hesum sambandi viðgera vit einans tínar persónupplýsingar, um okkara áhugamál greitt viga tyngri enn fyrilitini fyri tær við serligum denti á tínum áhuga í, at vit ikki viðgera tínar persónupplýsingar.

**Heimildargrundarlagið fyri okkara viðgerð**

- Dátuverndarlógin § 8, stk. 1, nr. 1 (Samtykki)
- Dátuverndarlógin § 8, stk. 1, nr. 2 (Avtala)
- Dátuverndarlógin § 8, stk. 1, nr. 3 (Lóggáva)
- Dátuverndarlógin § 8, stk. 1, nr. 6 (Heimilað endamál)

**Heimilaði endamál við viðgerðini**

Sum nevnt omanfyri fer okkara viðgerð av tínum persónupplýsingum fram partvíst grundað á heimilað áhugamál, sbrt. § 8, stk. 1, nr. 6, í dátuverndarlógini.

Heimilaðu áhugamálini eru t.d.:

- At fyribyrgja misnýtlsu og sviki
- At styrkja um KT-trygdina
- Kundatænasta, kundanøgdsemi, ráðgeving, umsiting og undirvísing í hesum viðurskiftum
- Menning, greining og umsiting av okkara tænastum, veitingum, skipanum og virksemi
- Hagfrøðilig endamál
- Marknaðarførsla av okkara tænastum og veitingum
- Fyri at áseta ómaksgjøld og prísir
- Eyðmerking og góðkenning av kundum
- Váðastýring

**Sløg av persónupplýsingum**

Vit viðgera hesi sløg av persónupplýsingum um teg:

- Grundleggjandi persónupplýsingar, t.d. títt navn, kyn, føðidato, bústað, telefonnummar og tín teldupostbústað
- Almenn eyðmerkingarnummur, t.d. p-tal, skrásetingarnummar hjá akfari og matrikkulnummar
- Fíggjarligar upplýsingar, t.d. peningastovn og kontoupplýsingar, umframt upplýsingar um tína inntøku
- Upplýsingar um tína familju, børn og títt húsarhald

- Upplýsingar um tína útbúgving og títt arbeiði
- Upplýsingar um títt tilknýti til tryggingartakara, tryggjaða ella skadda
- Upplýsingar um tær veitingar og tænastur, sum vit veita tær

**Viðkvæmar persónupplýsingar**

Sambært dátuverndarlógini eru ávísar persónupplýsingar viðkvæmar. Viðkvæmar persónupplýsingar skulu sambært lógini verjast serliga væl. Upplýsingar um húðarlit og ættarslag, um átrúnaðarliga, heimspekiliga ella politiska sannføring, um revsiverd og kynslig viðurskifti, heilsustøðu, fakfelagstilknýti, munandi sosialar trupulleikar og onnur heilt privat viðurskifti verða roknaðar sum viðkvæmar upplýsingar.

Vit skráseta og viðgera bara viðkvæmar persónupplýsingar í tann mun, tað er neyðugt fyri at kunna geva tær ráðgeving ella bjóða tær eina tænastu ella veiting. Tá ið tað er neyðugt at viðgera viðkvæmar persónupplýsingar, biðja vit um títt samtykki, um viðgerðin ikki er lógarheimilað, lógarkravd ella er neyðug fyri at gera eitt rættarkrav galdandi.

Viðkæmar persónupplýsingar, sum vit skráseta um teg, kunnu m.a. vera:

- Heilsuupplýsingar: Okkara tænastur krevja í ávísum førum, at vit mugu heinta og viðgera heilsuupplýsingar um teg, t.d. um tú fært ein persónskaða. Hetta kunnu vera upplýsingar, sum eru í læknajournali, og tað kann somuleiðis vera upplýsingar um núverandi ella fyrrverandi likamligar ella sálarliga sjúkur, heilsustøðu, skaðar, o.s.fr.
- Upplýsingar um fakfelagstilknýti: Í ávísum førum viðgera vit upplýsingar um títt fakfelagstilknýti. Hetta kann vera neyðugt, tá nakrar ávísar tryggingar krevja limaskap í einum fakfelag.
- Upplýsingar um revsiverd viðurskifti: Í ávísum føri viðgera vit upplýsingar um revsiverd viðurskifti, hetta kann t.d. vera um ein tryggingarskaði viðvíkir eini hending, sum er meldað til løgregluna.

Okkara førleiki at veita tær best møguligu ráðgevingina í mun til tín tørv er í ávísan mun tengdur at, hvussu væl vit kenna teg. Tí er tað týdningarmikið, at tær upplýsingar, sum tú letur okkum, eru rættar og neyvar, og at tú kunnar okkum um møgiligar broytingar í viðurskiftum, ið upplýsingarnar viðvíkja.

**Bólkar av persónum, ið vit skráseta upplýsingar um**

Vit skráseta einans upplýsingar um persónar, um hetta er neyðugt. Í sambandi við viðgerð av tíni trygging ella skaða kann tað verða neyðugt at viðgera upplýsingar um hesar bólkar av persónum:

- Møguligar kundar og tilboðsmóttakarar
- Tryggingartakarar og tryggjaðar persónar

- Rættindahavarar
- Avvarðandi
- Skaddar persónar
- Mótpartar og vitnir
- Verjar og umboðsfólk
- Ráðgevarar (t.d. bankaráðgeva, advokat, grannskoðara)
- Viðgerðar (t.d. lækna, sálarfrøðing, fysioterapeut)
- Samstarvsfelagar ( t.d. handverkarar og umvælarar)

**Hví og hvussu skráseta og viðgera vit tínar persónupplýsingar?**

Vit skráseta og viðgera persónsupplýsingar í sambandi við, at vit veita tænastur og veitingar umframt annað virksemi, undir hesum:

- Søla og umsiting av tryggingum
- Skaðaviðgerð
- Kundatænasta, kundanøgdsemi, ráðgeving, umsiting og undirvísing í hesum viðurskiftum
- Menning, greining og umsiting av okkara tænastum, veitingum, skipanum og virksemi
- Hagfrøðilig endamál
- Marknaðarførsla av okkara tænastum og veitingum
- Fyri at áseta ómaksgjøld og prísir
- Eyðmerking og góðkenning av kundum
- Váðastýring
- Fyri at verja teg og Trygd móti sviki
- Fyri at styrkja um KT-trygdina
- Fyri at lúka lógarkrøv

Vit innsavna upplýsingarnar beinleiðis frá tær ella við at eygleiða tínar gerðir, t.d. tá:

- Tú fyllir út umsóknir ella onnur oyðubløð í sambandi við bílegging av tænastum og veitingum
- Tú sendir okkum skjøl
- Tú ringir til okkara
- Tú brúkar okkara heimasíðu, appir, tænastur og veitingar
- Tú luttekur í kundakanningum ella átøkum, sum vit skipa fyri

**Móttakarar ella bólkar av móttakarum**

Vísandi til lógina um tryggingarvirksemi hava vit tagnarskyldu og viðgera altíð tínar persónsupplýsingar í trúnaði. Meginreglan er tí altíð tann, at vit ikki lata tínar persónsupplýsingar víðari. Vit deila tó í ávísum førum tínar persónupplýsingar við triðjapartar í og uttan fyri BankNordik-samtakið:

- Vit lata upplýsingar um teg víðari í BankNordik-samtakinum, um vit hava títt samtykki ella ein lógarheimilaðan rætt ella heimild til tess
- Vit lata upplýsingar til samstarvsfelagar, t.d. einum verkstaði ella einum handverkara, tá ið hetta er neyðugt fyri at viðgera ein fráboðaðan skaða
- Vit lata upplýsingar til viðgerðar og læknar, tá ið hetta er neyðugt fyri at viðgera ein fráboðaðan skaða
- Vit lata í avísum førum upplýsingar til onnur tryggingarfeløg, tá ið hetta er neyðugt fyri at viðgera ein fráboðaðan skaða
- Sambært galdandi lóggávu hava vit í ávísum førum skyldu til at lata almennum myndugleikum upplýsingar, t.d. til TAKS og Akstovuna
- Í sambandi við arbeiðsskaðar lata vit sambært lóggávu upplýsingar um teg til Føroya Vanlukkutryggingarráð
- Í sambandi við KT-menning, hýsing, rakstur, sakstýring, tænastuveiting og marknaðarførslu flyta vit persónupplýsingar til dátuviðgerar. Vit tryggja, at tíni rættindi eru vard, og at trygdarstigið er nøktandi í sambandi við tílikan flutning av upplýsingum

**Flutningur til móttakarar í útlondum, triðjalondum ella í millumtjóðafelagsskapum**

Í sambandi við KT-menning, hýsing, rakstur, sakstýring, tænastuveiting og marknaðarførslu flyta vit persónupplýsingar til dátuviðgerar. Tá ið vit lata víðari upplýsingar til dátuviðgerar, verður hetta gjørt í samsvari við skrivligar dátuviðgeraravtalur. Vit tryggja, at tíni rættindi eru vard, og at trygdarstigið er nøktandi í sambandi við tílikan flutning av upplýsingum.

Tá vit flyta persónupplýsingar til útlond, triðjalond ella millumtjóðafelagsskapir verður hetta altíð gjørt í samsvari við kapittul 6 í dátuverndarlógini.

**Hvaðani persónupplýsingarnar stava**

Vit skráseta og viðgera persónupplýsingar, sum vit móttaka frá triðjaparti, undir hesum frá:

- Landsfólkayvirlitinum og øðrum almennum keldum og skráum. Vit skráseta og viðgera upplýsingarnar t.d. fyri at eftirkanna neyvleikan av upplýsingum um teg

- Feløgum í BankNordik-samtakinum, um tú hevur givið títt samtykki, ella vit hava lógarheimild til tað
- Í sambandi við tekning av trygging, kunnu vit móttaka upplýsingar um teg frá øðrum tryggingarfeløgum
- Í sambandi við eina skaðahending kunnu vit móttaka upplýsingar um teg frá samstarvsfeløgum, frá læknum og øðrum viðgerðum, frá øðrum tryggingarfeløgum, frá løgregluni og frá øðrum almennum myndugleikum
- Í sambandi við arbeiðsskaðar, sum tú hevur fráboðað okkum, móttaka vit upplýsingar um teg frá Føroya Vanlukkutryggingarráði, tá ið tey hava tikið avgerð

**Tíðarskeiðið, sum persónupplýsingarnar verða goymdar**

Vit goyma tínar persónupplýsingar, so leingi tað er neyðugt í mun til tey endamál, sum upplýsingarnar vórðu innsavnaðar til.

- Núverandi kundar: Vit goyma altíð tínar persónupplýsingar, meðan tú ert kundi hjá okkum, og annars í 5 ár.
- Møguligir kundar: Um tú hevur fingið eitt tilboð um trygging frá okkum uttan at taka av, verður hetta strikað aftaná 6 mánaðir.
- Fyrrverandi kundar: Tá ið avtalan við okkum er endað, verða upplýsingarnar goymdar fram til fyrningarfreistina fyri viðkomandi avtalu. Um tú t.d. hevur havt ein persónskaða, sum er viðgjørdur hjá okkum, er fyrningarfreistin tilsamans 20 ár, og upplýsingarnar verða tí goymdar í 20 ár frá tí, at sakin er endaliga viðgjørd. Upplýsingar um tingskaðar goyma vit í 5 ár frá tí, at sakin er endaliga viðgjørd.

**Rættin til at taka samtykkið aftur**

Tú kanst altíð taka títt samtykki aftur. Hetta kanst tú gera við at seta teg í samband við okkum (sí samskiftisupplýsingar í fyrsta broti).

Um tú velur at taka títt samtykki aftur, ávirkar tað ikki løggildi av okkara viðgerð av tínum persónupplýsingum fram til afturtøkuna. Um tú tekur títt samtykki aftur, hevur tað bert virknað fyri framtíðina.

**Tíni rættindi**

Sambært dátuverndarlógini hevur tú rættindi í sambandi við okkara viðgerð av tínum persónupplýsingum. Um tú ynskir at nýta tíni rættindi, skalt tú seta teg í samband við okkum (sí samskiftisupplýsingar í 1. broti).

- Rætturin til innlit (§ 26): Tú hevur rætt til at fáa innlit í tær upplýsingar, sum vit viðgera um teg.

- Rætturin til rætting (§ 27): Tú hevur rætt til at fáa rangar upplýsingar um teg sjálva/n rættaðar.
- Rætturin til striking (§ 28): Í summum førum hevur tú rætt til at fáa upplýsingar um teg sjálva/n strikaðar, áðrenn okkara ætlaðu striking.
- Rætturin til viðgerðaravmarking (§ 29): Í summum førum hevur tú rætt til at fáa viðgerðina av tínum persónupplýsingum avmarkaða. Um tú hevur rætt til at fáa viðgerðina avmarkaða, kunnu vit framyvir í útgangsstøðinum bert goyma persónupplýsingarnar.
- Rætturin til dátuflutning (§ 31): Tú hevur í summum førum rætt til at fáa tínar persónupplýsingar útflýggjaðar í einum skipaðum, vanligum nýttum og teldutøkum sniði, og at fáa hesar persónupplýsingar fluttar frá einum dátuábyrgdara til ein annan uttan forðing.
- Rætturin til mótmæli (§ 32): Tú hevur í summum førum rætt til at mótmæla okkara viðgerð av tínum persónupplýsingum. Tú kanst eisini mótmæla okkara viðgerð av tínum persónupplýsingum til beinleiðis marknaðarføring.

**Kæra til Dátueftirlitið**

Tú hevur rætt til at kæra til Dátueftirlitið, um tú ert ónøgd/ur við okkara viðgerð av tínum persónupplýsingum. Tú finnur samskiftisupplýsingarnar hjá Dátueftirlitinum á heimasíðuni www.dat.fo.